# FØROYSKA RÁÐGEVARA-VINNAN Í TØLUM

RÁÐGEVARAFELAGIÐ

**Í hesum faldara verður greitt frá, hvat felagið hjá føroyskum arkitektum, verkfrøðingum og byggifrøðingum, Ráðgevarafelagið, ger, og hvussu gongdin hevur verið í ráðgevaravinnuni seinnu árini.**

**Í Ráðgevarafelagnum eru 28 arkitektavirkir, verkfrøðingavirkir og byggifrøðingarvirkir. Tey samstarva um felags áhugamál og virka fyri at gera vart við sjónarmiðini hjá vinnuni. Feløgini ráðgeva og standa fyri leiðsluni í sambandi við m.a. nýbyggingar, tilbyggingar og anleggsarbeiðir. Anleggsarbeiðir kunnu vera havnir, brýr og tunlar.**

**Planlegging er ein annar týðandi partur av virkseminum. Talan kann vera um býarplanlegging, byggisamtykkir og planlegging av landsløgum. Í nøkrum av fyritøkunum eru færri enn trý starvsfólk, í teimum flestu eru millum fýra og tíggju starvsfólk, og í trimum teimum størstu eru millum 11 og 50 starvsfólk.**

## BREIÐA VITAN OG DRÚGVAR ROYNDIR

**Føroyska ráðgevaravinnan hevur drúgvar royndir og breiða vitan um øll sløg av arbeiðum, sum tørvur er á at fáa gjørt í Føroyum. Merkisvert er, at vinnan megnar at veita Føroyum at kalla allar neyðugar ráðgevaratænastur, tí føroysku fyritøkurnar hava royndirnar, vitanina og førleikarnar.**

Ráðgevaravinnan strembar eftir, at hetta eisini í framtíðini verður so, tí fyrimunirnir við, at ráðgevingin verður veitt á staðnum, eru nógvir. Í fyrsta lagi verða vitanarstørv varðveitt í landinum. Í øðrum lagi er ráðgevingin smidligari, tá hon verður veitt í nærumhvørvinum. Í triðja lagi eru føroysku tímatakstirnir lægri enn í okkara grannalondum. Haraftrat kemur, at samfelagið hevur stórt gagn av, at vitanin um at byggja anlegg og bygningar eftir føroyskum fortreytum verður varðveitt og ment her á landi.



## BÝTIÐ MILLUM ALMENT OG PRIVAT

Fyritøkurnar í ráðgevaravinnuni gera arbeiðir fyri almennar stovnar og felagsskapir og privat feløg. Hesi tøttu samstørv eru grundarlagið undir virkseminum hjá vinnuni. Ein greining, sum Ráðgevarafelagið hevur gjørt, vísir, at tað almenna, tvs. land og kommunur, er nógv tann størsti samstarvsfelagin hjá ráðgevaravinnuni. Tøl frá limafeløgunum vísa, at í 2011 vórðu 47 prosent av arbeiðunum gjørd fyri kommunur, 31 prosent fyri landið og 18 prosent fyri vinnulívið.

### KUNDASAMANSETING




Í 2013 vórðu 44 prosent av arbeiðunum hjá fyritøkunum gjørd fyri kommunurnar, 27 prosent fyri landið og 25 prosent fyri tað privata. Sum tølini vísa, verða alsamt fleiri arbeiðir gjørd fyri tað privata. Hetta kemst av, at bjartskygnið í vinnulívinum hevur verið vaksandi, og at fleiri íløgur eru gjørdar.

Tøl hjá Føroya Gjaldstovu vísa, at fleiri almennar íløgur eisini hava verið gjørdar seinnu árini, men vøksturin er ikki komin ráðgevaravinnuni til góðar. Hví so er statt, er óvist. Møguliga verða ráðgevaratænastur spardar burtur, ella hevur tað almenna sett fleiri fólk í starv at loysa uppgávurnar innanhýsis. Ein triði møguleiki er, at útlendsk ráðgeving verður brúkt.

### FAKLIGIR SEKTORAR




## SLØG AV ARBEIÐUM OG SAMSÝNINGARHÆTTIR

Limirnir vórðu eisini spurdir, hvørji sløg av arbeiðum teir hava havt. Í 2011 vóru 65 prosent av arbeiðunum bygningar, 24 prosent anlegg og átta prosent planlegging. Í 2013 vóru 57 prosent av arbeiðunum bygningar, 32 prosent anlegg og seks prosent planlegging. Anleggsparturin er vaksin við átta prosentum, meðan annað minkar.

Spurt varð eisini, hvussu limirnir vórðu samsýntir í sambandi við arbeiðini – rokningsarbeiði við ongum tímalofti, við tímalofti, føstum prísum ella prosentum av byggikostnaðinum.

Í 2011 vórðu 53 prosent av arbeiðunum samsýnt við føstum prísum, 35 prosent rokningsarbeiði við ongum tímalofti, sjey prosent við tímalofti og fimm prosent við prosentum av byggikostnaðinum.

Í 2013 vórðu 47 prosent av arbeiðunum samsýnt við føstum prísum, 42 prosent rokningsarbeiði við ongum tímalofti, sjey prosent við tímalofti og fýra prosent við prosentum av byggikostnaðinum.

At fleiri avtalur verða gjørdar um samsýning fyri gjørt arbeiði uttan tímalofti, er til fyrimunar fyri fyritøkurnar, tí hesin hátturin er smidligari og leggur upp fyri óvæntaðum kostnaðum.



Fyritøkur umboðandi 106 starvsfólk svaraðu í 2011. Hetta var 75 prosent. Umsetningurin var 58 mió. kr. Í 2013 umboðaðu svarini 116 starvsfólk ella 69 prosent. Umsetningurin var 64 mió. kr.

### SAMSÝNINGARFORMUR




Tó er samlaði umsetningurin í vinnugreinini hetta tíðarskeiðið mettur til:

| | |
|---|---|
| **2011** | 76.791 mió kr. |
| **2012** | 81.332 mió kr. |
| **2013** | 93.005 mió kr. |

## SAMANBORIÐ VIÐ DANMARK

Verða føroysku tølini samanborin við donsk tøl, sæst beinanvegin, at danska ráðgevaravinnan er nógv størri, og danskar ráðgevara-fyritøkur hava nógv arbeiðir uttanlands.

Í Danmark vórðu 16 prosent av arbeiðunum gjørd fyri kommunur og kommunal feløg í 2013. Í Føroyum var tann kommunali parturin heili 44 prosent. Av øllum arbeiðum Í Danmark í 2013 vórðu 22 prosent gjørd fyri statin ella feløg hjá statinum. Í Føroyum vórðu 27 prosent gjørd fyri landið.

Privati parturin í Danmark var 35 prosent ímóti 25 prosentum í Føroyum í 2013, og haraftrat vórðu níggju prosent av arbeiðunum í Danmark gjørd fyri elfeløg.

Arbeiðini fyri útlendskar kundar í Danmark vóru tilsamans 14 prosent. Her var talan um arbeiðir fyri bæði privatar fyritøkur, almennar stovnar og altjóða felagsskapir. Hesin parturin er áhugaverdur samanborið við føroysku tølini, tí hjá føroysku fyritøkunum eru at kalla ongi arbeiðir uttanlands.

**Vakstrarmøguleikar eru sostatt í vinnuni. Í meira enn hálva øld hevur hon lyft fakliga krevjandi uppgávur í Føroyum og hevur tí royndir at standa seg eisini uttanlands.**

## AVBJÓÐINGAR VIÐ ÚTBJÓÐINGUM

Føroyski marknaðurin er lítil, og fleiri av ráðgevarafyritøkunum eru smáar. Kortini skulu tær standa seg líka væl sum stórar útlendskar fyritøkur í sambandi við útbjóðingar. Sjálvt heilt smá arbeiðir verða ofta boðin út, og mangan kann vera møtimikið og kostnaðarmikið hjá fyritøkunum at seta saman tilboð og síðan kanska als ikki fáa arbeiðini.

Sambært donsku vinnugreinafeløgunum hjá ráðgevandi verkfrøðingunum og arkitekt-unum bjóða privatir byggiharrar ikki ráð-gevarauppgávur út í kapping uttan so, at tað beinleiðis loysir seg.

Tey siga eisini, at smærri ráðgevaravirkir í Danmark í stóran mun virka sum húsráðgevar, – fyri tað mesta í tí privata geiranum, sum lutfalsliga er væl størri enn tann føroyski, men eisini hjá tí almenna.

Í Danmark er loftið fyri, nær almen arbeiðir skulu bjóðast út, 500.000 kr., men danska ráðgevaravinnan strembar eftir, at loftið verður hækkað upp í 1,2 mió. kr. Hetta verður gjørt, tí vinnan ásannar, at kostnaðarmikil tilboðs-geving kann skaða lønsemið hjá fyritøkunum, og tí avmarkað mangan er, hvat útbjóðarin fær burturúr.

At fastprísparturin lutfalsliga er væl størri í FO enn í DK er eisini tekin um, at prískappingin er



harðari og møguleikarnir fyri at skapa lønsemi eru minni her heima. Eisini hevur verið vanligt, at almennir byggiharrar í útbjóðingum læsa kostnaðin fyri ráðgevingina við teirri avleiðing, at ein stórur váði er lagdur á ráðgevan.

Eyðsæð er, at útbjóðarar í summum førum kunnu fáa fyrimun av, at arbeiðir verða boðin út, ikki minst í sambandi við prísáseting av arbeiðum. Ráðgevarafelagið er heldur ikki ímóti, at skipað verður fyri útbjóðingum, men vísir bara á, at í summum førum eru tær meira møði enn føði hjá ráðgevarafyritøkunum.

**Mælt verður til, at útbjóðingar-politikkurin verður liðiligur, eins og hann er í privata geiranum, hararbeiðir kunnu verða boðin út, men samstarvs-felagar meira enn so kunnu verða valdir beinleiðis.**

## GÓÐUR ÚTBJÓÐINGARSIÐUR NEYÐUGUR

Ráðgevarafelagið hevur fyrr víst á, at almennar útbjóðingar av arbeiðum í Føroyum ofta ikki hava verið nóg væl frágingnar, m.a. tí treytirnar hava verið ógreiðar. Felagið hevur gjørt vart við, at tað er ein ósiður, at útboð verða tikin aftur, tá arbeiðini eru tillutað vinnandi fyritøkunum. Í summum førum hava fyritøkur latið tilboð upp á arbeiðir, sum kostaðu eina milión at gera, men fingu bara 200.000 kr. endurgoldnar.

Hetta skaðar lønsemið.

Dømi eru eisini um, at fyritøkurnar hava ikki fingið upplýst, hvussu metingarparametrini í sambandi við útbjóðingar skuldu vektast. Trupult er tá at geva nøktandi tilboð. Hóast felagið í fleiri førum hevur verið ónøgt við útbjóðingarhættirnar, fegnast felagið um tætta samstarvið við land, kommunur og privata geiran. Felagið er sannført um, at besta samstarvið verður rokkið við støðugum samskifti millum partarnar, so bestu úrslitini kunnu røkkast øllum pørtum at gagni.

## RÁÐGEVARAVINNAN Í FRAMTÍÐINI

Ráðgevarafelagið er sannført um, at arbeiðið, sum fyritøkurnar í felagnum gera, ikki bara er av stórum týdningi fyri útbjóðararnar, men eisini Føroyar yvirhøvur. Í Føroyum búgva 48.500 fólk, og í londum av somu støðd er als ikki sjálvsagt, at ráðgevaratænastur sum tær, ið føroysku fyritøkurnar veita, eru tøkar.

**Vert er at hava í huga, at í dagsins samfelag verður áhaldandi tosað um at skapa fleiri vitanarstørv, og at vitanarvinnur eru framtíðin. Ráðgevaravinnan er ein vitanarvinna, sum longu er í Føroyum, og sum kann mennast uppaftur meira í samstarvi við almennar myndugleikar og privata geiran. Tilsamans 116 vitanarstørv eru í ráðgevara-vinnuni, og fólkini, sum manna hesi størvini, megna at veita nærum allar ráðgevara-tænastur innan bygging í Føroyum**

Stórar verkætlanir eru framdar í samfelagnum, sum føroysku ráðgevarafyritøkurnar lutvíst hava verið partur av, men tær kundu gjørt uppaftur fleiri av arbeiðunum. Um talan er um havnarløg, undirsjóvartunlar ella stórar bygningar, so er nóg mikið av førleikum í Føroyum til, at bara føroysk feløg kunnu veita tænasturnar í sambandi við arbeiðini ■



# VEITINGAR FRÁ FØROYSKUM RÁÐGEVARAFYRITØKUM

**Veitingarskrá fyri feløgini sum Ráðgevarafelagið umboðar, er at finna á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum. Í veitingarskránni eru upplýsningar um støðd á virki, slag av virki og yvirlit yvir veitingar frá virkinum.**

## VEITINGAR

**Anleggsuppgávur**
» Vegir
» Parkeringsøkir
» Parkeringshús
» Brúgvar
» Tunlar
» Havnir og kajøkir
» Flogvallir

**Byggiharraráðgeving**
» Hugskot
» Teknisk finansieringsanalysa
» Byggiskrá
» Uppmáting og skráseting
» Fíggjarráðgeving

**Bygningar**
» Einbýlishús - sethús
» Íbúðarhús í fleiri hæddum
» Gistingarhús o.t.
» Sjúkrahús
» Røktarheim o.a
» Samkomuhús og kirkjur
» Undirvísingarbygningar
» Dagstovnar
» Handlar og sølubygningar
» Skrivstovuhøli o.t.
» Ítróttarbygningar
» Farstøðir
» Ídnaðarbygging
» Orkustøðir
» Aðrir tekniskir bygningar

**Bygningsrakstur**
» Rakstrar- og viðlíkahalds ætlan
» Implemetering av rakstrar- og viðlíkahalds ætlan
» Bistand til rakstur

**Design**
» Standard Innbúgv
» Standard Útgerð
» Sniðgeving av innbúgv
» Skelting
» Listprýðing

**Onnur ráðgeving**
» BIM/3D projektering
» IKT
» Visualisering
» Animering
» Modell
» Brunaráðgeving
» Akustisk ráðgeving
» Ferðslu ráðgaving
» Maskin konstruktiónir
» Prosesstøkni
» Jarðfrøði
» Lívfrøði
» Tilbúgving

**Planlegging**
» Landslagsplanlegging
» Býarplanlegging
» Byggisamtyktir
» Býarbygging og býarúm
» Serstakar byggisamtyktir

**Projektering**
» Nýbygging
» Tilbygging
» Umvæling og umbygging
» Restaurering

**Ráðgeving**
» Heildarráðgeving
» Fakráðgeving
» Fakeftirlit
» Byggileiðsla
» Projekteringsleiðsla
» Kostnaðarmeting og -stýring
» Góðsku- og váðaleiðsla
» Umhvørvisleiðsla
» Kontrahering
» Bygningssýn
» Orkukanning
» Inniklimakanning

**Tekniskar anleggsuppgávur**
» Spillvatnsskipanir
» Fjarhitaskipanir
» Vatnveitingarskipanir
» Olju- og gasskipanir
» El veitingar skipanir
» Renovatiónsskipanir

**Umhvørvi**
» Burðardygd
» VVM kanningar
» Orkumetingar
» Jørðdálking

RÁÐGEVARAFELAGIÐ
Óðinshædd 7, Postboks 1038
110-Tórshavn, Tel. 309900
industry@industry.fo

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY